# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KÆRLEIKI FYRI 4 MIÓ KRÓNUR

»Gunnar í Liða velur kærleikan fram um pengarnar«.

Soleiðis skrivaði Portalurin 29. oktober í fjør, tá Gunnar í Liða boðaði frá, at hann legði frá sær sum stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar. Kanska hevur hann valt kærleikan, men hann hevur so sannilga eisini valt pengarnar. Tí nevndin í Tryggingarfelagnum er so góð við Gunnar í Liða, at hann hevur fingið fýra milliónir afturfyri at fara frá!

Nevndarlimirnir í Tryggingarfelagnum hava eisini sambært Dimmalætting hækkað sínar egnu samsýningar við meiri enn eini helvt, so at teir í miðal fáa 300.000 krónur um árið fyri at sita í nevndini.

So seint sum síðsta fríggjadag feldi umboðsráðið hjá felagnum eitt uppskot um at demokratisera valið av umboðsráðnum. Skipanin er gjørd so fløkt, at teir allar flestu eigararnir ikki velja til umboðsráðið og ikki fáa møguleikan at brúka sín demokratiska rætt at velja, meðan tey valevnið standa felagnum nær, fáa felagið at senda atkvøðuseðlar út til sínar stuðlar. Í stóran mun eru tað vinnukundar, sum atkvøða, tí teir hava hartil hoyrir, tí talan er um eitt sínamillum tryggingarfelag, sum allir tryggingartakarar eiga á líka føti í fleiri atkvøður.

Tað sum hesi góðu fólk gloyma er, at tað er vanligi føroyingurin, sum eigur Tryggingarfelagið Føroyar, TF Holding, Eik Banka og alt, sum hartil hoyrir, tí talan er um eitt sínamillum tryggingarfelag, sum allir tryggingartakarar eiga á líka føti í mun til tryggingargjaldið. Men við at leggja seg soleiðis á maktina, so megna nakrir persónar at halda seg til, og tí ber tað til at hækka sínar egnu samsýningar so nógv, og at geva einum stjóra fýra milliónir aftur fyri at fara frá – og so at premiera hann við velja hann sum formann í nevnd felagsins. Og sum nýggjan stjóra setur nevndin so bara ein annan nevndarlim. Álvaratos, hvat er tað, sum hendir? Er alt avtalað spæl?

Eftirhondini kenna vit øll søguna um Eik Banka. Søguna um ein grunn, sum átti meirilutan av bankanum og sum varð stýrdur av nevnd og stjórn.

Tað endaði galið, so galið, at nógvir bláoygdir føroyingar hava mist



dýrtkentan sparipening, sum nakrir marglætistjórar og nevndarlimir hava brúkt at gambla við. Og hvat ger man við teir stjórarnar, jú teir verða sendir til hús við fleiri milliónum í reyvalummanum.

TF Holding er vorðin ein risastórur aktørur á føroyska fíggjarmarknaðinum. Tað krevur ábyrgd, og tað krevur álit. Við at handla soleiðis, sum felagið ger nú, verður als ikki biðið um álit frá eigarunum – men beint tvørturímóti.

Spurningurin er, um ikki politiski myndugleikin eigur at halda eitt vakið eyga við, hvussu hesi fólk fara við fólksins ogn.

**Er talan um avtalað spæl millum nakrar fáar persónar?**



## ES-limaskapur nærkast

Tað tykist, sum um Fólkaflokkurin umsíðir er hoknaður í knøunum, og nú er við at leggja um sína strategi í uttanríkismálum. Flokkurin vil nú nærkast ES, og tað merkir mest sannlíkt, at flokkur um stutta tíð verður talsmaður fyri ES-limaskapi.

Higartil er tað bara Sambandsflokkurin, sum hevur tónað reint flagg fyri limaskapi. Tjóðveldi er í síni náttúru ímóti, meðan Javnaðarflokkurin í síni náttúru átti at verið fyri slíkum millumtjóðasamstarvi, tí ein sosialdemokratiskur flokkur er ikki nationalur, men internationalur í síni grundhugsan. Tað er tí, at javnaðarfólkum dámar so væl at sygja »Internationala!«, sum stríðssangur floksins eitur.

Ísland hevur skift støðu. Noreg roynir alsamt at skifta støðu. Eftir eru Føroyar, ið dáma best at koma darlandi aftaná.

*Okkurt bendir soleiðis á, at kjakið næstu árini kanska heldur fer at snúgva seg um samband við Evropa enn loysing frá Danmark...*

## So lætt tá onnur gjalda...

At makt korrumperar, tað siggja vit so mangan, og tað hava vit fleiri ferðir víst á.

Fyrr í vikuni funnust vit at okkara politikarum, sum í hesum døgum viðgera uppskotið um pensjónsreform, har vit øll skulu gjalda 15 prosent inn í onkra skipan, so vit soleiðis sjálvi gjalda okkara pensjón gjøgnum eitt langt arbeiðslív.

Politikarar halda tó sjálvir, at teir sveima oman fyri vanliga fólkið. Tí hava somu politikarar gjørt av, at fólkið skal gjalda landsstýrismonnum 75.000 krónur *um mánaðin* í pensjónsinngjaldi. Soleiðis kunnu teir savna sær saman eina fulla feita pensjón upp á 30.000 – løgmaður tó 36.000, eftir einans átta árum. Enntá kunnu summir teirra fara upp á pensjón sum 60 ára gamlir – og tað merkir vanliga 50 prosent oman á pensjónsinngjaldið, sum tá er 112.500 krónur.

Um tað er korrupt, tað kann man so diskutera. Tað er í øllum førum ómoralskt.

Men tað eru ikki bara politikarar, sum eru soleiðis. Tí soleiðis ger man eisini í til dømis bankum, og eisini í Tryggingarfelagnum, sum so at siga allir føroyingar eiga.

*Altso. Tá tað snýr seg um pengar, sum øll eiga, men sum nøkur fá hava ræði á, so skal man skalta og valta og kráma sum mest til sín sjálvs. Tað gera politikarar, og tað gera tey, sum ráða í til dømis TF Holding.*

*Men tað má nokk vera fólkið, sum er býtt. Fólkið, sum letur slíkt um seg ganga. Man kann jú ikki snýta nakran, sum veit, at hann verður snýttur, er tað ikki so?*





**Strategi uttan strategi**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 16



**Løgin aðalfundur**

JOHAN PETERSEN
KJAK Á SÍÐU 20




## Youtube bjargaði ikki Heina

Á ein hátt er elsti maður á tingi, 72 ára gamli Heini O. Heinesen, tann mest modernaði løgtingsmaðurin. Hann er tann, sum í størstan mun hevur brúkt Youtube til tess at fáa fólk á tal.

Men hansara egnu fólk í Norðoyggjum vilja ikki hava hann í løgtinginum longur, hóast hann hevur umboðað flokkin á tingi í 23 ár, verið floksformaður, tá flokkurin økti løgtingsumboðanina við 100 prosentum og verið íðin tjóðveldismaður alt sítt lív.

Mikukvøldið tók hann somu miðlar í brúk, sum uppreistrarfólkið í eitt nú Egyptalandi og Libya, sum við Facebook, Twitter og Youtube megnaðu at fella Hosni Mubarak, sum hevur stýrt Egyptalandi næstan líka síðani Heini O. Heinesen stillaði upp fyri fyrstu ferð, og sum nú geva Gadaffi í Libya ein skarpan gang.

Men tað var altso ikki nóg mikið hjá Heina O. Heinesen at koma á listan hjá Norðoyar Tjóðveldisfelag. Spurningurin er so, um toppstýringin kann tryggja honum eitt pláss á listanum.... :-]

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*